120-daga reglan skal burtur

Hans Pauli Strøm skj‡tur upp, at 120-daga reglan á arbei›smarkna›inum ver›ur tikin burtur, og at størri fyrilit ver›ur víst teimum, sum gerast sjúk

ARBEI‹S-MARKNA‹UR
Magnus Dam

Fólk, sum gerast sjúk ella skadd í longri tí›, skulu ikki blakast til hús og missa møguleikan at koma aftur til arbei›is. Ta› heldur Hans Pauli Strøm, løgtingma›ur, sum vil hava landsst‡ri› at broyta starsfólkalógina, so tann sokalla›a 120-daga reglan ver›ur strika› úr lógini.

120-daga reglan ásetir, at

ein arbei›sgevari kann siga einum starvsfólki upp vi› 1 mána›a freist, um starvsfólki› hevur havt 120 sjúkradagar í einum ári og kortini fingi› løn alla hesa tí›ina. Hans Pauli Strøm skj‡tur upp, at landsst‡ri› strikar hesa regluna og gevur teimum sjúkramelda›u ein møguleika afturat.

Sum n‡ggj regla kann ver›a ásett, at arbei›splássi› og Almannastovan í felag royna at fyribyrgja uppsøgn og í ø›rum lagi, at uppsagnartí›in ikki er styttri enn 4 mána›ir, sigur Hans Pauli Strøm í vi›merkingunum til uppskoti›.

Sosial ábyrgd

Javna›artingma›urin sigur, at hendan n‡ggja reglan í lógini er at skilja sum ein grein um sosiala ábyrgd á arbei›splássinum.

Almennu arbei›sgevararnir kunnnu ganga á odda vi› at skipa eitt sjúkrará› á almennu arbei›splássunum, so sleppast kann undan uppsøgn orsaka› av sjúku.

Í sjúkrará›num kunnu sita umbo› fyri arbei›sgevaran, fakfelag ella álitisumbo› og ein sosialrá›gevi frá Almannastovuni. Uppgávan ver›ur at skipa fyri, at arbei›suppgávur og arbei›stí› ver›ur laga› til breki› hjá tí, sum gerst sjúkramelda›ur. Møguleiki eigur eisini at vera fyri vardum starvi hjá teimum, sum eru sjúk í longri tí›, heldur Hans Pauli Strøm.

Tingma›urin sigur, at fólk, sum gerast sjúk, ikki eiga at ver›a uppsøgd, men í sta›in fáa møguleika av var›veita tilkn‡ti› til arbei›smarkna›in.

– Ta› er ein ógvuslig hending hjá fólki, sum hava havt fast tilkn‡ti til eitt arbei›spláss í drúgva tí›, og í hesum tí›arskei›i eisini hava bygt upp eina uppsagnarfreist, bara at ver›a uppsøgd vi› 1 mána›a freist, um tey gerast sjúk eitt longri tí›arskei›. Fyrti ta› fyrsta ver›ur tann uppsagnarfreistin, tey annars hava vunni› sær rætt til, tikin frá teimum, tí uppsagnarfreistin í vanligum førum er nógv longri. Fyrti ta› næsta ver›a tey koyrd til hús uttan fyrilit fyri teirra egnu stø›u, og fyri ta› tri›ja missa tey ikki bara tilkn‡ti› til arbei›splássi›, men til arbei›smarkna›in yvirhøvur, sigur hann í vi›merkingunum.

Gó›ar royndir

Hans Pauli Strøm sigur, at onnur lond hava havt gó›ar royndir av at taka 120-daga regluna úr lógini og í sta›in gera eitt sjúkrará› á almennu arbei›splássunum.

– So leingi 120-daga reglan var galdandi, hev›i arbei›splássi› eina passiva stø›u til sjúkrafráveruna og lat standa til. Tá teir 120 dagarnir vóru farnir, vór›u fólk uppsøgd. Nú 120-daga reglan er burtur, og sjúkrará› er skipa› á arbei›splássinum, ver›a longu tí›liga í eini sjúkraráveru tikin aktiv stig til at broyta vi›urskiftini, sum elvdu til sjúkrafráveruna. Og ta› kunnu vera vi›urskifti bæ›i hjá tí sjúka og á arbei›splássinum, sigur Hans Pauli Strøm.

– Tingma›urin heldur, at ta› eigur at vera høvu›státturin í einum virknum starvsfólkapolitikki – og uppsagnarpolitikki - at skapa fortreytir á arbei›splássinum fyri einum gó›um arbei›sumhvørvi, og ta› er ta›, sum uppskoti› mi›ar ímóti, sigur hann.

Landshúsarhaldi› d‡rkar

Desember mána›ur gerst d‡rur fyri landskassan. Landsst‡risma›urin í fíggjarmálum ba› t‡sdagin løgtingi› um 21 milliónir krónur í eykajáttan

EYKAJÁTTAN
Magnus Dam

Oljan hevur veri› óvanliga d‡r hetta ári›, og hetta rakar ikki bara vanliga húsarhaldi›. Landshúsarhaldi› brúkar eisini olju, og hetta hevur økt munandi um útrei›slurnar hjá almennum stovnum.

Ein partur av teimum 21 milliónunum, sum Karsten Hansen t‡sdagin ba› løgtingi› játta, fer til meirútrei›slur í samband vi› d‡ru oljuna. Øll tr‡ sjúkrahúsini skulu hava ein part av pengunum, tí útrei›slurnar til olju eru øktar, Magnus Heinason hevur eisini merkt d‡ra oljuprísin, og ikki minst Strandfer›slan, sum fær eina eykajáttan uppá 1,3 milliónir krónur.

Eldrarøkt og pensjónir

Ein stórur partur av pengunum í eykajáttanarlógini skulu kortini brúkast til lógarbundnar útrei›slur.

Landi› og kommunurnar b‡ta ikki longur útrei›slurnar í almannaøkinum millum sín. Frá 1. juli í ár hevur landi› bori› allan kostna›in av hesum økinum, og afturfyri hava kommunurnar bori› allan kostna›in av barnaansingarøkinum. Hetta d‡rkar í fyrsta umfari› nógv um almannaútrei›slurnar. Meira enn 11 milliónir skulu játtast til eldrarøkt og somulei›is 11 milliónir til fólkapensjónir. Harumframt gerst vanliga forsorgin umlei› tríggjar milliónir d‡rari fyri landskassan. Tilsamans ber hendan broytingin í sær ein meirkostna› fyri landskassan uppá 32 milliónir krónur.

Aftur í kassan

Men umlei› 26 milliónir krónur koma aftur í kassan, tí landi› skal ikki gjalda kommununum endurgjald fyri barnaansingina. Játtanin til dagstovnar ver›ur tí lække› 25,8 milliónir krónur.

Eitt anna› stórt tal í eykajáttanini fyri desember eru útrei›slurnar til rentustu›ul. Rentan er hækka› fleiri fer›ir í ár, og tí ver›ur eisini ney›ugt vi› hægri játtan til rentustu›ul. Karsten Hansen hevur tí bi›i› løgtingi› um gó›ar seks milliónir krónur afturat til rentustu›ul.

Samla›u eykajáttanirnar higartil í ár hava veri› 116,4 mió. kr. Løgtingi› skal vi›gera eykajáttanarlógina fyri desember á tingfundinum í dag.

Doy›i av bló›tøppi í hjarta

Eirikur Lindenskov

Í bla›num í gjár skriva›u vit um 62 ára gamlan mann í Nólsoy, sum var dey›ur úti. Av uppl‡singunum, bla›i› fekk, kundi skiljast, at hann lá dey›ur úti, men so var ikki. Hann hev›i sta›i› og práta› vi› fólk, og tá hann var gingin einar hálvthundra› metrar frá teimum, small hann.

Tá menn lítila løtu seinni komu til hansara, var hann dey›ur av hjartaste›gi, var› sta›fest á Landssjúkrahúsinum.

Pensjonistar sleppa ikki undan MVG

Pensjónistar fáa ískoyti á fíggjarlógini til olju, sjónvarps- og útvarpsgjald, og tí er eingin ætlan um at sleppa teimum undan at gjalda MVG av hesum

MEIRVIR‹ISGJALD
Magnus Dam

3.387 krónur fáa ávísir pensjonistar um ári› frá landinum sum eitt ískoyti til olju, sjonvarps- og útvarpsgjald. Hetta røkkur sambært Bjarna Djurholm, landsst‡rismanni í vinnumálum, til MVG'i› fyri hesar tænasturnar, og tí ætlar landsst‡risma›urin ikki at sleppa pensjonistunum undan at gjalda MVG.

Hetta sigur landsst‡risma›urin í einum svari uppá fyrispurning frá He›ini Mortensen tingmanni. Sambandstingma›urin vildi hava at vita, um landsst‡risma›urin tekur undir vi›, at pensjonistar sleppa undan at gjalda MVG av sjónvarps- og útvarpsgjaldinum og olju og el-orku.

Men hóast Bjarni Djurholm tekur undir vi›, at nógv eru kroyst fíggjarliga, so tekur hann ikki undir vi› at sleppa pensjonistunum undan MVG. Hann vísir á vi›bótina, sum pensjonistar fáa á fíggjarlógini. Hon er ætla› til júst hetta, og er sambært Bjarna Djurholm naka› hægri enn MVG-útrei›slurnar. Eitt vanligt húski í Føroyum rindar umlei› 3000 krónur um ári› í MVG av útvarps- og sjónvarpsgjaldinum og oljuni. Um el-orkan ver›ur tikin vi› eisini, er MVG'i› umlei› 4400 krónur. Hjá pensjonistum eru hesar útrei›slurnar helst naka› lægri, roknar landsst‡risma›urin í vinnumálum vi›.

Hægri vi›bót

Bjarni Djurholm kundi kortini hugsa› sær, at pensjonistar sleppa lættari á annan hátt. Hann vísir á, at oljuprísurin er so høgur sum ongantí› fyrr, og líkt er ikki til, at hann lækkar. Hann ætlar sær tí at taka stig til, at naka› ver›ur gjørt vi› hendan trupulleikan. Hóast ta› ikki er hansara málsøki, so fer hann kortini at venda sær til landsst‡rismannin í almannamálum, Helenu Dam á Neystabø, og bi›ja hana endursko›a vi›bótina, sum pensjonistar fáa á fíggjarlógini. Stendur ta› til Bjarna Djurholm ver›ur vi›bótin hækka, so pensjonistarnir fáa betri rá› at gjalda sjónvarps- og útvarpsgjaldi› og til at skrúva upp fyri hitanum, tá i› ta› gerst ov kalt inni.

Ivasamir um uppskoti› hjá Jóannes

Ta› er ikki vist, at uppskoti› um at broyta heimast‡rislógina fyri at sta›fesa føroyskt sum tjó›armál ver›ur samtykt. Løgma›ur og varaløgma›ur ivast í hugskotinum hjá Jóannes Eidesgaard

MÁLSTRÍ‹I‹
John Johannessen

– Vit skulu ikki bi›ja danir áseta í fólkatingslóg, hvat skal vera galdandi í Føroyum.

Hetta er vi›merkingin frá Høgna Hoydal, varaløgmanni, til uppskoti› hjá Jóannes Eidesgaard um at fáa fólkatingi› og løgtingi› at samtykkja at broyta grein 11 í heimast‡rislógini, so lei›is at føroyskt ver›ur sta›fest tjó›armál.

Høgni Hoydal heldur ta› vera øvugt at fara og sminka heimast‡rislógina, samstundis sum landsst‡ri› arbei›ir vi› eini ætlan um at avrigga heimast‡rislógina vi› tí endamáli at fáa fullveldi.

– Hetta er sum at lata gamalt vín í n‡ggjar le›urfløskur, sigur Høgni Hoydal.

Kann ska›a

Anfinn Kallsberg, løgma›ur, vísir ikki uppskotinum hjá Høgna Hoydal frá sær í eins stóran mun, sum Høgni Hoydal. Men kortini heldur hann, at ta› er ein vansi vi› uppskotinum hjá Jóannes Eidesgaard.

– I prinsippinum er uppskoti› í lagi, men eg eri bangin fyri, at samrá›igar vi› donsku stjórnina um at broyta grein 11 í heimast‡rislógini aftur skapa tær ósemjur, sum fullveldissamrá›ingarnar slitna›u uppá. Samrá›ingarnar fara uttan iva at koma inn á spurningin, um Føroyar eru tjó› ella ikki, sigur løgma›ur.

Anfinn Kallsberg vísir á, at danska stjórnin undir seinastu samrá›ingum gjørdi heilt greitt, at hon ikki tekur undir vi›, at Føroyar eru tjó›. Tí heldur hann, at stjórnin fer at gera ta› sama, um samrá›ast skal um málspurningin.

– Danska stjórnin hev›i allar møguleikar at taka føroysku vi›urskiftini vi›, tá hon sta›festi evropeiska málsáttmálan. Men stjórnin valdi at síggja burtur frá áheitanunum úr Føroyum, tí er heilt greitt, at danska stjórnin ikki ynskir føroyskt at vera tjó›armál, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgma›ur veit ikki, um hann fer at mæla flokki sínum til ella frá at atkvø›a fyri uppskotinum hjá Jóannes Eidesgaard. Hann hevur síni fyrivarni, tí hann er bangin fyri, at ta› kann ska›a ta› samskifti, sum nú er um sjálvst‡risleistin.

Hinvegin heldur løgma›ur, at hetta uppskoti› – um ta› ver›ur samtykt - kann fáa Javna›arflokkin at skilja trupulleikarnar hjá landsst‡rinum.

Teir bá›ir stóru andstø›uflokkarnir fara helst ikki at taka undir vi› uppskotinum um at broyta grein 11 í heimast‡rislógini fyri at fáa sta›fest føroyskt sum tjó›armál